# Hava ráðstevnu um stýrisskipanir

*Mikudagin koma útlendskir serfrøðingar til Føroyar at viðgera og greiða frá ymiskum stýrisskipanum*

Eyðun Klakstein

Fýra virdir stjórnmálafrøðingar úr útlondum koma í næstu viku til Føroya at verða við á eini ráðstevnu í Norðurlandahúsinum.

Ráðstevnan fer at viðgera ymsar stýrisskipanir, nú tað hevur verið umfatandi politisk umrøða av, hvussu framtíðar støðan hjá Føroyum skal vera. Alt frá eini veruligari loysing til einum framhaldi av ríkisfelagsskapinum verður nevnt, og enn er landsstýrið ikki komið á mál við síni roynd at vinna Føroyum fullveldi.

- Hetta er eitt heitt politiskt mál, men ráðstevnan fer ikki at taka støðu til gongdina í Føroyum. Ráðstevan fer at upplýsa um og viðgera ymiskar stýrisskipanarhættir, sigur Bogi Eliasen, sum saman við søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum skipar fyri ráðstevnuni. Hann lesur stjórnmálafrøði á universitetinum í Århus, haðani hann eisini hevur fingið ráðgeving í sambandi við ráðstevnuna.



*- Føroyar gerast alsamt meira áhugaverdar at granska í, og tí hevur tað eydnast at fingið hesar serfrøðingarnar hendan vegin, sigur Bogi Eliasen, sum skipar fyri ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Mynd: Álvur Haraldsen*

### Breið viðgerð

Teir fýra menninir, sum koma at halda fyrilestrar á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, eru úr Danmark, Skotlandi, Englandi og USA, og teir eru allir kend nøvn í stjórnmálafrøðini.

Brendan O'Leary, professari, sum kemur úr London, fer at at tosa um mentanarligt stjálvstýri. Nelson Polsby, professari, kemur frá universitetinum í California og fer at tosa um amerikanska sambandsríkið. Polsby er ein virdur serfrøðingur í amerikansku stýrisskipanini.

James Mitchell, professari, kemur úr Skotlandi, og hann fer at greiða frá sjálvstýrisgongdini hjá Skotlandi. Seinasti røðarin er Dr. Mads Qvortrup, sum er lærari á universitetinum í Århus.

- Hetta er ein faklig ráðstevna, sum fer at lýsa møguleikar bæði sambandsvegin og loysingarvegin, sigur Bogi Elisen, fyrireikari.

- Endmálið er ikki at siga, at soleiðis og soleiðis skal tað vera, men heldur at vísa á møguleikar og hvat verður gjørt aðrastaðni.

### Føroyar áhugaverdar at granska í

Ætlanin var í fyrstu syftu at hava ráðstevnuna í Keypmannahavn, men teir útlendsku granskararnir vildu heldur sleppa til Føroya.

- Føroyar gerast alsamt meira áhugaverdar at granska í, og tí hevur tað eydnast at fingið hesar serfrøðingarnar hendan vegin. Teir vilja gjarna uppliva samfelagið og tosa við fólk her, sigur Bogi Eliasen.

Hevði ráðstevnan verið hildin í Danmark hevði eingin trupulleiki verða fingið fígging til hana. Eftir at hon varð flutt til Føroyar hevur verið neyðugt at leita eftir stuðli frá vinnulívinum.

- Vónandi kann hendan ráðstevnan verða við til at seta gongd í gransking í Føroyum, har vinnulívið eisini er við til at fíggja granskingina, sigur Bogi Eliasen.

### Hitta politikarar

Sjálv ráðstevnan er mikudagin, men nú verður arbeitt við møguleikanum at lata umboð fyri politisku flokkarnar hitta teir fýra útlendsku serfrøðingarnar á einum fundi týskvøldið.

Um hetta fer at verða veruleiki, verður hesin fundurin fyri stongdum hurðum, tí ætlanin er, at bæði granskarar og politikarar kunnu tosa frítt við hvønn annan, uttan at skula standa til svarts fyri almenninginum.

Eini 80 fólk høvdu í gjár meldað seg til ráðstevnuna, og talan er um alt frá lesandi til pensiónistar. Vinnulívið hevur eisini tikið væl ímóti ráðstevnuni, og politikarar og embætisfólk finnast eisini millum fundarfólki.

Tað ber til at melda seg til ráðstevnuna í dag afturat.

## Soleiðis meldar tú teg til

Eini 80 fólk høvdu í gjár meldað seg til ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, men nógv pláss eru framvegis eftir, og tað ber til at melda seg til í dag afturat. Fólk, sum hav huga at verða við, kunnu melda seg til á telefon 319617 ella 282603. Eisini ber til at senda teldupost á bgls@get2net.dk ella bogi_eliasen@hotmail.com.

Ráðstevnan hevur snikkað sær eina heimasíðu til á internetinum, og hon finnist á adressuni www.vit.fo/territorial. Har ber millum annað til at lesa upplýsingar um ráðstevnuna og um teir, sum fara at halda fyrilestur.

Ráðstevnan byrjar mikudagin klokkan 10.00, og heldu fram út á seinnapartin. Endin er ein pallborðsfundur, sum byrjar klokkan 16.00.

Tað kostar 500 krónur at vera við. Lesandi sleppa fyri 200 krónur. Í steðginum er kalt borð, sum tað er neyðugt at melda seg til og gjalda fyri.

# Gekk væl við ferðsluni

*Eingin ófriður var í sambandi við landsdystin mikukvøldið*

Eyðun Klakstein

**Tórshavn:** Løgreglan í Havn er væl nøgd við avgreiðsluna av nógvu ferðsluni, sum var í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Danmark á Tórsvølli mikukvøldið.

Fleiri enn 6000 fólk vóru til dystin, og nógv av teimum ferðaðust í egnum bili. Tí var tað onkur sum frammanundan stúrdi fyri ruðuleika í ferðsluni, men soleiðis varð ikki.

- Nógv havnafólk gingu til dystin í góða veðrinum, og størsti parturin av fólkunum kom í rættiliga góðari tíð, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

### Góð hjálp

Fólk funnu sær sjálv parkeringspláss ymsastaðni nærindis Tórsvøll, og tað vóru ikki øll, sum vildu koma so nær Tórsvølli sum gjørligt, tí á parkeringsplássinum vestanfyri ovara vøll, var pláss fyri fitt av bilum afturat.

Suðuroyingarnir, sum ferðaðust norður til Havnar við Smyrli, vóru teir seinastu, sum komu til dystin, men heldur eingin trupulleiki var í tí sambandi.

Løgreglan hevði eini 14 fólk til arbeiðis í sambandi við dystin, men harafturat fekk løgreglan hjálp frá Bjargingarfelagnum í Havn til at avgreiða nógvu ferðsluna.

- Fólkini frá Bjargingarfelagnum eru von við at loysa hesa uppgávuna, og tað er ein stór hjálp hjá okkum, sigur vakthavandi á politistøðini í høvuðsstaðnum.

### Onkur koyrdur heim

Gott lag var á fólki, sum fóru til landsdystin mikukvøldið, og eftir dystin var nakað av fullum fólki í býnum - ið hvussu so er meira enn vanligt er eitt mikukvøld.

Onkur hevði fingið so nógv inn um, at løgreglan mátti fáa viðkomandi til hús, men eingin handtøka var í sambandi við landsdystin. Alt gekk friðarliga fyri seg bæði á Tórsvølli og í býnum annars.

Næsti stóri fótbóltsdysturin verður 3. september. Tá fara Føroyar og Slovenia at spæla HM-dyst á Svangaskarði.





# Fimtanhundrað fáa endurgjald frá Føroya Tele

*Brekið á avrokningarskipanini hjá Føroya Tele hevur havt við sær, at ellivu túsund og fimmhundrað telefonsamrøður eru skeivt avroknaðar. Í øllum hesum førum hava telefonfelagarnir goldið ov nógv, og teir fáa nú peningin afturgoldnan*



Rúnar Reistrup

Umleið 1500 fólk kunnu gleða seg til at fáa pengar frá Føroya Tele í næstum.

Eftir at Sosialurin týsdagin gjørdi vart við, at brek var á avrokningarskipanini, hevur Føroya Tele arbeitt nátt og dag fyri at kanna, hvat var galið og hvussu nógvar pengar talan var um, at telefyritøkan hevði tikið ov nógv fyri telefonsamrøður.

Í gjár kom Føroya Tele so endiliga við einari frágreiðing um málið, har tað millum annað kemur fram, at fólk í fyritøkuni hava vitað um brekið síðan mars mánað í ár.

Ikki fyrr enn síðst í mei mánaði varð brekið rættað, og hóast tað, er fyritøkan ongantíð farin út til viðskiftafólk síni at greiða frá brekinum. Hetta hóast tað allatíðina hevur verið greitt, at brekið hevur havt við sær, at telefonfelagar hava goldið meira enn teir áttu at goldið.

### Felagar máttu sjálvir stíga fram

Tað eru sostatt bert teir telefonfelagar, ið sjálvir hava fingið illgruna um brekið og síðan hava vent sær til Føroya Tele, sum hava fingið endurgjald fyri tað, teir hava goldið ov nógv.

Teir telefonfelagarnir, ið ikki sjálvir hava gjørt vart við seg, hava ikki fingið endurgjald, og høvdu allarhelst ongantíð fingið tað, um ikki málið kom fram í fjølmiðlunum.

Talan er tilsamans um einar 1.500 telefonfelagar, ið hava goldið ov stóra rokning, og samanlagt er ov nógv innkravda upphæddin einar hálvtannaðhundrað túsund krónur.

### Ikki ætlanin at tiga burtur

Sambært stjóranum á Føroya Tele, Andras Róin, hevur tað ongantíð verið ætlanin hjá fyritøkuni at tiga feilin burtur fyri viðskiftafólkunum.

Stjórin á Føroya Tele vil vera við, at orsøkin til at málið um brekið á avrokningarskipanini ikki er komið fram er, at hann sjálvur ikki hoyrdi um brekið, fyrr enn Sosialurin setti seg í samband við hann mánadagin.

– Vit kenna nú feilin, hann er blivin rættaður, men tað óhepna er okkara handfaring av málinum, viðgongur Andras Róin.

– Tey, ið hava funnið brekið, hava ikki hildið tað verið vert at greitt leiðsluni frá tí, og tað er har, at tann stóri feilurin liggur. Tí aldantíð at vit finna ein systematiskan feil á avrokningarskipanini, so eiga allar alarmklokkur at fara í gongd, og leiðslan eigur at verða kunnað beinanvegin, sigur Andras Róin.

### Nú verður ruddað upp

Tað er við øðrum orðum internir trupulleikar av onkrum slag, ið hava havt við sær, at málið er blivið so eymt, sum tað gjørdist, og hesar ætlar Andras Róin nú at fáa upp á pláss.

– Her skal heilt víst nakað av upprudding til í organisatiónini, sigur stjórin á Føroya Tele avgjørdur.

Brekið á avrokningarskipanini, ið hevði við sær, at uppringingar til føroyskar GSM fartelefonir uttanlands í fleiri førum gjørdust ovurdýrar, byrjaði sambært Føroya Tele 26. oktober mánaði í fjør, tá umleggingar fóru fram í GSM skipanini. Fyrstu ferð telefyritøkan gjørdist varug við trupulleikan var í mars mánaði í ár.

31. mei varð brekið so endiliga rættað, og síðan tá hevur avrokningin virkað sum hon skal.

Men stjórnin í Føroya Tele bleiv eftir øllum at døma ongantíð kunnað um brekið, og tað hevði við sær, at viðskiftafólkini hjá Føroya Tele ikki vórðu kunnað um at tey høvdu goldið ov nógv.

Spurningurin er so hví hetta hendi, og tann spurningin roynir fyritøkan nú at fáa svar uppá innanhýsis.

